**UTTAN ÚR HEIMI**

## Hol á oljuleiðing

Norske Shell noyddist at steðga framleiðsluni á einum palli í Norskahavinum, tí ein rørleiðing er farin at leka.

Kunningarstjórin hjá felagnum sigur, at umleið 100 rúmmetrar av olju runnu út í havið, men at tað mesta varð savnað saman og er fingið upp. Í gjár var bert lítil olja eftir. Hinvegin er felagið ikki komið eftir, hvar lekin er, men tað verður nú kannað. So leingi framleiðslan liggur still, rennur ikki meiri olja út í havið.

Draugen-pallurin er á Draugen-leiðini á Haltenbankanum einar 80 fjórðingar vestan fyri Kristiansund. Vanliga framleiðir pallurin einar 200.000 tunnur av olju um samdøgrið, men Norske Shell sigur, at framleiðslan fer ikki í gongd aftur, fyrr enn lekin er funnin og tettur.

## Óttast neytaøði í USA

Amerikansku bøndurnir stúra fyri, at tann herviliga sjúkan neytaøði kann fara at breiða seg suður um kanadiska markið, har myndugleikarnir júst hava staðfest enn ein tilburð av sjúkuni.

Tað ørkymlar eisini amerikansku bøndurnar, at tað tekur so langa tíð at staðfesta sjúkuna. Í Kanada vísti tað seg at taka hálvan fórða mánað. Tann 31. januar kannaðu djóralæknar eina kúgv, men ikki fyrr enn tann 16. mai varð endaliga staðfest, at kúgvin hevði neytaøði.

Síðani staðfestingina hava amerikansku myndugleikarnir steðgað øllum innflutningi við livandi neytum og neytakjøti úr Kanada. Í fjør útfluttu kanadisku bøndurnir 575.000 tons av neytakjøti, og 90 prosent fóru á amerikanska marknaðin. Eingin kúgv í USA hevur havt neytaøði, síðani sjúkan fyrstu ferð varð staðfest í Bretlandi fyri 17 árum síðani, og Ann Veneman, landbúnaðarmálaráðharri, sigur, at stjórnin fer at gera alt, sum gerast kann, fyri at forða fyri, at sjúkan kemur til landið.

## Doyðu í hitabylgju

Tað hevur verið óvanliga heitt har suðuri í India í seinastuni, og sambært myndugleikunum eru minst tjúgu fólk deyð av tí nógva hitanum.

Í landspartinum Andhra Pradesh hava tey mált upp í 46,2 stig. Í so nógvum hita ber ikki til at sita innandura, og tað er beinleiðis lívshættisligt at vera úti í sólini orsakað av vandanum fyri hitaslagi. Harafturat kemur, at nógv av húsunum í landspartinum eru úr jarni, og tí er tað sum at sita í einum bakarovni at vera í hesum húsunum, tá sólin hitar jarnið.

Hitabylgjur eru á hvørjum ári í India. Í fjør doyðu meiri enn 1.000 fólk har suðuri í landinum í einari hitabylgju. Ta ferðina fór hitin upp um 50 stig.

## Bløðini framgongd

Eftir stórar fíggjarligar trupulleikar í fleiri ár er tað farið at ganga tann rætta vegin hjá svensku bløðunum.

Dagens Nyheter, sum er flaggskipið hjá forlagnum Bonniers, hevur havt stóra framgongd. Í januar ársfjórðingi í fjør hevði blaðið 39 milliónir krónur í halli, men í sama ársfjórðingi í ár var úrslitið 31 milliónir krónur í avlopi. Sambært leiðsluni kemst hetta lutvíst av sparingum, men eisini øktari blaðsølu. Harafturat eru inntøkurnar frá lýsingum eisini øktar.

Eitt annað kenst svenskt blað, Expressen, hevur eisini havt stóra framgongd. Fyrsta ársfjórðing í fjør hevði blaðið heilar 81 milliónir krónur í halli. Úrslitið fyrsta ársfjórðing í ár var eisini skeivu megin, men nú var hallið bert 700.000 krónur.

# Nyttar ikki at tosa um frið so leingi Arafat hevur vald

**Palestinski leiðarin eigur at missa alt politiskt vald, tí so leingi hann hevur nakað vald, verður ikki friður. Tað sigur fyrrverandi ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Barak.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*



*Syrgjandi fólk hava verið vanlig sjón í Ísrael seinastu dagarnar, og hesum slepst ikki undan, so leingi Arafat hevur nakað vald, sigur Ehud Barak*

Fyrrverandi generalurin og forsætisráðharrin vil vera við, at Yasser Arafat er tann størsta forðingin fyri, at nakað kann spyrjast burtur úr tí seinasta friðaruppskotinum, sum ST, ES, USA og Russland hava lagt fram.

- Vit mugu síggja til, at Arafat missir alt útinnandi vald. So leingi hann hevur minsta myndugleika ella eftirlit, verður eingin semja millum Ísrael og palestinar, sigur Ehud Barak.

Barak sat sjálvur við samráðingarborðið saman við Arafat í Camp David í USA fyri trimum árum síðani. Einki spurdist burtur úr samráðingunum, og Barak hevur seinni sagt, at tað var Arafat, sum lá í buktini. Tveir mánaðir eftir slitið í Camp David, byrjaði tann palestinski uppreisturin, sum hevur staðið við síðani.

Ísraelska tjóðartingið samtykti fyrradagin, at landið skal "forfylgja" øllum, sum avsanna, at seks milliónir jødar lótu lív undir seinna heimsbardaga. Samtyktin var greitt vend ímóti palestinska forsætisráðharranum, Mahmoud Abbas, sum fyri nógvum árum síðani skrivaði í einari ritgerð, at minni enn ein millión jødar doyðu undir krígnum.

Tjóðartingið, sum hevur 120 limir, samtykti uppskotið við trettan atkvøðum ímóti fimm. Hinir tinglimirnir vóru burturstaddir. Samtyktin er kortini ikki bindandi.

# USA stendur tilbúgvið til yvirgangsatsóknir

**Amerikansku myndugleikarnir hava økt tilbúgvingina orsakað av økta virkseminum hjá al-Qaeda.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*



*USA stendur tilbúgvið. Her hevur ein vápnaður løgreglumaður steðgað einum lastbili uttan fyri San Fransisco*

Amerikanska tilbúgvingin er í fleiri stigum, og hvørt stig hevur sín lit. Seinastu tíðina hevur tilbúgvingin verið gul, men nú eitur hon "orange", sum er tað næstovasta stigið.

Orsøkin er, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda hjá Osama bin laden er farin at gera vart við seg aftur. Amerikanarar ivast ikki í, at tað var al-Qaeda, sum skipaði fyri teimum blóðugu atsóknunum, sum kostaðu 75 mannalív í Saudiarabia og Marokko í síðstu viku.

Amerikansku fregnartænasturnar halda, at al-Qaeda er farið undir eitt átak ímóti málum um allan heimin, og at teir eisini fyrireika álop á mál í sjálvum USA. Tí er eftirlitið styrkt munandi við ymisk tjóðareyðkenni, brýr, tunlar, floghavnir, ítróttarpláss, kirkjur og aðrastaðni. Bara í býnum Los Angeles hava myndugleikarnir staðfest, at har eru eini 600 støð, sum mugu metast sum møgulig álopsmál.

Myndugleikarnir viðganga, at teir hava ongar upplýsingar, sum siga, nær ella hvar yvirgangsmenninir ætla at leypa á, men teir bera ótta fyri, at okkurt kann henda um vikuskiftið, tí júst hetta vikuskiftið plaga nógvir amerikanarar at fara á útferð.

# ítróttur

Nr. 96 • hósdagur • 22. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

B71-B36 2-0 (1-0):

## Eingin ivi

**Sandoyingar vunnu ein tryggan sigur á B36. Nógv tryggari, enn tølini siga**

2. DEILD
*Jákup Mørk*



*Sandoyingar vóru ivaleysir, tá B36 var á vitjan leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Størsta einstaka orsøkin til, at B71 ongan tíð fekk lagt seg í oddastríðið í aðru deild í fjør, var, at liðið ikki megnaði at vinna teir sonevndu løttu dystirnar. Eitt nú kiksaði tað tvær ferðir móti B36, har B71 annars hevði havt á leið 90 % av spæli og møguleikum.

Tí hava sandoyingar helst nakað at rætta upp á í ár, og fyrsta royndin gav í øllum førum positivt úrslit. B36 var á vitjan, men hóast gestirnir helst fingu lagt nakað av brennievni inn undir seg, so var tað eisini tað einasta, sum teir fingu við sær.

Á vøllinum var nevnliga eingin ivi. Eitt at kalla blaðungt B71-lið við einstøkum veteranum setti teir so dyggiliga upp á pláss.

B71 var omaná í snøgt sagt øllum, og teir fingu eisini løn fyri hetta undan steðginum, tá Símun Hansen sendi bóltin í málið.

Eftir steðgin var søgan stórt sæð hin sama. Tað gekk tó striltið hjá heimaliðnum at fáa beint allan iva til viks, men eftir at Tummas Pauli Olsen hevði økt um munin, kundu sandoyingarnir draga andan nakað lættari.

Spurningurin er so, um úrslitið er tekin um, at sandoyingarnir nú eru um at koma veruliga fyri seg. Sum sagt, so er talan í stóran mun um eitt nýtt lið, sum nú verður spælt saman, og tá kann stabilitetur ofta gerast ein mangulvøra. Hvørt so verður, er tó enn ov tíðliga at siga nakað um, men ein góð byrjan er so undir ongum umstøðum at forkasta.

**B17-B36 2-0 (1-0)**

1-0: Símun Hansen
2-0: Tummas Pauli Olsen

TB-VB 4-2 (3-0):

## Heimamenninir nýttu møguleikan

**Hóast AB í stórum pørtum av dystinum var væl við, so var tað TB, sum var greitt omaná í málskjótingini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Bæði TB og AB eru í ár nýggj í aðrudeildarhøpi, men fortreytirnar eru tó ymiskar. TB er aldursforsetin í føroyskum fótbólti við eini gyltari fortíð, sum liðið tó hevur havt ilt við at liva upp til seinastu tíðina. Eisini hóast liðið javnan hevur vitjað í bestu deildini seinnu árini.

AB hinvegin er spildurnýtt í so máta. Fyri fyrstu ferð tekur liðið lut í næst bestu deildini, og tí var tað kanska við heilt serligum spenningi, at ferðin gekk til Tvøroyri.

Og um ikki annað, so fekk AB at vita, at tað kann vera náðisleyst at spæla í hægru deildunum. Í øllum førum um verjan ikki er nóg tøtt, samstundis sum ov fá mál verða skotin.

Tað var nevnliga í stuttum søgan hjá AB leygardagin. Í fyrra hálvleiki royndi liðið fyri tað nógva at trýsta. Teir høvdu bóltin nógv, men mál spurdust ikki burturúr. Heldur ikki hóast talan var um nakrar heilt stórar málmøguleikar.

Hinvegin dugdi TB væl at gera sær dælt, tá møguleikarnir vóru til staðar. AB hevði nakrar ferðir ligið framvið, men brádliga var vandi á ferð í hinum endanum. Ein misskiljing í AB-verjuni førdi við sær, at Kaj Roest brádliga gjørdist leysur, og ótarnaður kundi hann við høvdinum stýra bóltin í málið.

Nakað seinni gekk aftur galið hjá AB. Vandin tóktist ikki serliga stórur, tá bólturin varð sparkaður út frá, men við einum drønskoti sendi Rasmus Nolsøe bóltin beina leið í kassan til 2-0. Og beint fyri steðgin mundi dysturin endaliga verða avgjørdur, tá eitt fríspark úr stórari fjastøðu kundi ferðast beina leið í málið.

AB tóktist nærkast eini upploysn í seinna hálvleiki, eftir Allan Michelsen hevði økt um munin eftir eitt fyrimyndarligt álop, og tá Hans Jørgen Djurhuus síðani varð rikin av vølli, tóktist satt skrædl at vera í væntu.

Hetta hendi tó ongantíð. Tvørtur ímóti fór nú at gangast betri hjá AB, og tvær ferðir minkaðu teir um munin. Fyrst tá Eyðun Samuelsen var skjótastur á einum returi, og síðani tá Flóvin Jespersen hegnisliga legði ein bólt heilt upp í málhorni uttan møguleika hjá TB-málverjanum.

Nær nøkrum stigum komu argjamenninir tó ongantíð, men um ikki annað, so kundu teir fegnast um brennievni. Í Suðuroy er bensin nevnliga framvegis at fáa, og hjá AB var tað næstan so, at hvør maður hevði sín bil við á ferðini.

**TB-AB 4-2 (3-0)**

1-0: Kaj Roest
2-0: Rasmus Nolsøe
3-0: Kaj Roest
4-0: Allan Michelsen
4-1: Eyðun Samuelsen
4-2: Flóvin Jespersen